www.ns.fo

*Vit søkja*

# fleiri starvsfólk, ið veruliga flyta mørk, til Vinnudeildina

*Sum vinnukundaráðgevi gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum og øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Ljóðar hetta áhugavert og spennandi? Og hevur tú kunnleika, arbeiðsroyndir ella hóskandi útbúgving á økinum, ert tú kanska júst ein av okkara nýggju vinnukundaráðgevum. Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum peningastovni í støðugari menning, við flatari skipan og óbundnari samskipan, har tú í stóran mun hevur møguleika fyri at seta dám á tín arbeiðsdag. Har tú kemur at arbeiða saman við dugnaligum,virkisfýsnum og málrættaðum starvsfeløgum, ið dagliga flyta mørk, og soleiðis eru við til at skapa framburð.*

***Løn og setanarviðurskiftir***
*Eftir nærri avtalu, samsvarandi útbúgving og royndum umsøkjarans.*

***Umsókn***
*Umsókn saman við CV og prógvum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. august 2006 og skal sendast til: Norðoya Sparikassa, Starvsfólkadeildin, postboks 149, FO-700 Klaksvík, Føroyar.*

***Spurningar***
*Hevur tú eitthvørt at spyrja um viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við:*
*Eyðun Kjølbro, undirstjóra, tel. 475055 , t-postur: eydunk@ns.fo*
*ella Marner Mortensen, varastjóra, tel 475070 , t-postur: marner@ns.fo*



## Spyr bara – vit leiðbeina fegin!

*Gerandisdagurin, og í heila tikið tíðin vit liva í, er merkt av støðugt stórum broytingum. Og hetta er eisini galdandi fyri fíggjarheimin. Fyri Norðoya Sparikassi er 2006 eitt serliga spennandi ár við nýggjum deildum í Saltangará og Tórshavn – og nógv tíð og orka er løgd í at menna eitt nýtt konsept, har tað at støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa, gerst ein góð uppliving við høgum tænastustøði og góðari ráðgeving. Og ein hin mest týðandi táttur í einhvørjum slógbrótandi virksemi eru starvsfólkini! Er hetta nakað fyri teg, ert tú jaligur av lyndi, hevur góð samstarvsevni, humor, lætt við at tosa og samskifta við fólk, gott sjálvsálit, eins og tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt og við støðugt nýggjum avbjóðingum, er Norðoya Sparikassi kanska júst arbeiðsplássið fyri teg...*

Norðoya Sparikassi Ósavegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo



# Leiðari søkist til Shell-støðirnar í Havn

Shell søkir eftir nýggjum leiðara til tær báðar Shell-støðirnar í Havn - við Norðara Ringveg og á Frælsinum.
Leiðarin hevur fulla ábyrgd av dagligu leiðsluni og rakstrinum av Shell-støðunum
Talan er um eitt avbjóðandi, ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv, har tann rætti persónurin hevur góðar møguleikar at seta sín egna dám á tær báðar støðirnar í samstarvi við leiðsluna hjá Føroya Shell.

**Vit ynskja ein persón, sum er royndur innan handil og annars hevur hesar eginleikar:**

- ✔ Leiðslusinnaður
- ✔ Ágrýtin
- ✔ Tænastusinnaður
- ✔ Fleksibul
- ✔ Samstarvssinnaður
- ✔ Álítandi
- ✔ Jaligur og opin
- ✔ Røkin

Løn sambært avtalu

Áhugað kunnu venda sær til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, á telefon 347400 ella fartelefon 216899.

Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði og skulu í seinasta lagi mánadagin 21. august 2006 sendast til

Føroya Shell
Viðarnes
100 Tórshavn
att.: Erling í Liða

www.shell.fo

SISERKO 351800



## Almannastovan søkir sosialráðgevar

Á Almannastovuni arbeiða umleið 100 fólk, harav 7 starvast á Arbeiðsmarknaðardeildini í løtuni.

Hevur tú hug at royna teg í einum spennandi arbeiðsumhvørvi í støðugari menning við nógvum avbjóðingum? Søkt verður eftir sosialráðgevum til Arbeiðsmarknaðardeildina á Almannastovuni vegna uppnormering av deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara, á tlf. 353570 ella við at fara inn á heimasíðu okkara: www.almannastovan.fo ella á www.portal.fo. Umsóknarfreistin er 14. aug. 2006 kl. 12.00

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80

Sosialurin
Sosialurin i